**Avtala millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya:**

**Avtala um bráðkomna arbeiðsvakt sum døgnvakt á Heilsufrøðiligu starvsstovuni í sambandi við inn- og útflutning av matvørum**

***1. Endamál***
Í sambandi við óregluligan inn- og útflutning av fiski og fiskavørum til og úr Føroyum, serliga til og frá Euroasiatisku búskaparsamgonguni, er kravið, at Heilsufrøðiliga starvsstovan skal røkja sína myndugleikauppgávu í sambandi við inn- og útflutningin.

Fyri útflutning er serliga talan um útflutning frá føroyskum pelagiskum virkjum, har frystiskip í óregluligari sigling føra vøruna víðari til Euroasiatisku búskaparsamgonguna. Bráðkomna vaktin fer serliga at vera virkin í makrelvertíðini.

Fyri innflutning er serliga talan um innflutning umvegis marknaðeftirlitsstøðir frá skipum, ið vanliga eru skrásett í Russlandi.

At røkja hesa uppgáva uttanfyri upplatingartíðir stovnsins verður gjørd ein **bráðkomin arbeiðsvakt**.

***2. Skilmarkingar***
Grundleggjandi verður bráðkomna arbeiðsvaktin skipað við tilkalling og arbeiði í arbeiðsvaktini. Bráðkomna arbeiðsvaktin fevnur um í mesta lagi tveir limir, fevndir av sáttmálanum hjá AKF. Av hesum kann annar vera embætisdjóralækni.

Embætisdjóralæknin og/ella annar limur, fevndur av AKF-sáttmálanum, ið røkir bráðkomnu arbeiðisvaktina, er vanliga tann sami, ið røkir vaktina, fevnda av avtaluni "*Avtala um veterinera tilbúgvingarskipan á Heilsufrøðiligu starvsstovuni*".

***3. Bráðkomna arbeiðsvaktin***
Bráðkomna arbeiðsvaktin er uttan fyri stovnsins vanligu arbeiðstíð. Bráðkomna arbeiðsvaktin skal verða fráboðað í vanligari arbeiðstíð 24 tímar, áðrenn vaktin skal gerast virkin. Fyri bráðkomna arbeiðsvakt til vikuskifti skal verða fráboðað í seinasta lagi hóskvøld kl. 24.00. Bráðkomna arbeiðisvaktin er í mesta lagi 2 samdøgur.

Bráðkomna arbeiðsvaktin verður mannað við minst einum embætisdjóralækna og/ella øðrum limi, fevndur av AKF-sáttmálanum.

Tá ið vaktin verður umbiðin, er vaktin í minsta lagi 16 tímar gerandisdagar (t.e. frá kl. 16.00 til 08.00). Um vikuskiftið, halgidagar og fastar frídagar er vaktin 24 tímar.

Í bráðkomnu arbeiðsvaktini eru AKF-limirnir bert tøkir hjá tí viðskiftara, ið hevur umbiðið vaktina og annars eftir avtalu við viðskiftararnar, tá ið arbeiðið skal fremjast í arbeiðsvaktini.

***4. Uppgávur***

Bráðkomna arbeiðsvaktin skal, so skjótt sum til ber, fremja tær atgerðir og uppgávur, sum eru neyðugar, fyri at viðskiftarin, ið hevur umbiðið vaktina, kann fáa avgreidd síni myndugleikaviðurskifti við Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

Innanhýsis eftirlitsmanualur og upplæring annars eru grundarlagið undir arbeiðnum.
Dentur skal leggjast á, at fellur arbeiðið soleiðis, so skulu veteriner- og/ella heilsuváttanirnar verða gjørdar lidnar í bráðkomnu arbeiðsvaktini.

***5. Vaktarplanur***

Tá viðskiftari umbiður bráðkomna arbeiðsvakt, spyr Heilsufrøðiliga starvsstovan AKF-luttakararnar, ið frammanundan eru í vaktarskipan á HFS, hvørt tað ber til at røkja bráðkomnu arbeiðsvaktina. Hesir fáa fyrstu raðfesting, og ber tað hesum frá, verður roynt hjá øðrum limum hjá AKF.

***6. Samsýning***

Fyri at fara í bráðkomnu arbeiðsvaktina, við einari freist, ið er eitt samdøgur, verður latin byrjanarsamsýning til hvønn luttakara, svarandi til 16 tímar.

Fyri at vera tøkur í bráðkomnu arbeiðsvaktini fær hvør luttakari rindaðan vaktarpening í arbeiðsvaktini, sum er 12,25% av tímalønini hjá viðkomandi. Vaktarpeningurin er tað dupulta um náttina, leygardagar, sunnudagar, halgidagar og fastar frídagar. Tímalønin (ársløn/2080) verður roknað av grundlønini, t.e. ikki av viðbótum. Responstíðin er 2 tímar.
Tá ið arbeitt verður í bráðkomnu arbeiðsvaktini, verður hetta samsýnt við 200% av vanligu tímalønini hjá viðkomandi. Halgidagar og fastar frídagar 300%.Samsýningin verður rindað fyri hvønn byrjaðan ½ tíma.

Vaktargjald kann avspákast í samráð við leiðsluna ella útgjaldast.

Arbeiðstíðin telur frá tí, at AKF-limur fer heimanífrá og til komið verður heimaftur.

***7. Ígildiskoma og uppsøgn***

Avtalan kemur í gildi tann 20. februar 2017. Avtalan kann verða søgd upp saman við sáttmálanum.

*Tórshavn, 24. januar 2017*

*Akademikarafelag Føroya*

*Fíggjarmálaráðið*